## VIÐMERKINGAR

# Glotti í ófriðartíðum

HEINI OLSEN
Verkfrøðingur



**Fyrstu ferðina eg, júst fyri hálvari øld síðani, kom í fátæka, tilafturskomna og analfabetiska partin av heiminum, undraðist eg yvir, at ikki fátæka fólkið sum flóðalda skolaði inn í ríka partin at ræna tað, sum har var ella hinvegin í besta lagi har læra seg okkurt, sum heima kundi hækka teimum livifótin, sigur Heini Olsen millum annað í lesarabrævið**

Um ikki í heilum árum so í hvussu er eftir 18 árstølum í muslimskum londum, har blíðskapurin móti hinum fremmanda altíð lá fremstur í huga, harmar tað meg og húskið almikið, at Danmark skal hava komið sær og stóran part av heiminum í óføri við hesum óinntonktu tekningunum av Mohammed, profeti.

Siðvenja muslimanna er nú einaferð tann, at teir ikki vilja hava Mohammed avmyndaðan, og styrkin í hesi sannføring kann til dømis sammetast við, at maður kom til tín og segði, at móðir tín er ein skøkja, sum flest øll okkara helst mundu verðið heldur enn ikki sinnisrørd um, hóast ikki í so ógvisligan mun móti ósekum fólki, sum her í løtuni víða um verður gjørt, og sum eg á ongan hátt kann bera í bøtuflaka fyri; men fólk uttan kunnleika til frælsan, demokratiskan livihátt nýta her høvi til at forloysa allar innistongdar kenslur, sum annars vanliga eru forbodnar, tá um egin viðurskifti ræður. Flestu teirra uttan nakran sum helst kunnleika til, hvat tað er, sum íbirt hevur henda teirra vælkomna ófrið.

Hinvegin krevur okkara talu- og skrivifrælsi ábyrgd hins einstaka og vit og skil, harímillum umsorgan fyri ikki at særa næsta tín meira enn neyðugt, eisini um hann er jødi ella muslimur, ella kanska hallandi til onkra av okkara meira heimaspunnu trúargreinum.

Her á jørð er av náttúruávum so ovmikið at takast við av krevjandi hjálpararbeiði, og, hóast tað sambært demokratisku reglunum er loyvt móti betri vitandi soleiðis at leggja stein oman á byrðu, kann tað av sonnum sigast vera tápuligt óðamannaverk, sum her er gjørt.

Hetta kann kanska ikki beinleiðis samanberast; men í tríatiárunum loyvdi Hitler sær at nýta allar møguligar ræðumyndir um jødiska fólkið, og vit eldru minnast, hvussu m.a. tær myndirnar í miðjuni á okkara kristna umhvørvi kostaðu sjey milliónum jødum lívið.

Tíbetur eru nógvir einstaklingar, sum við næstakærleika liva eftir kristna boðskapinum; men annars hava sonevndu kristnu londini tíverri ikki nógv at reypa av, eitt nú um vit hugsa um krossferðaræningarnar og um hjálandapolitikkin, har fólk í fríløtum spákaðu sær út at skjóta til máls eftir upprunafólkinum ella eins og nevtoll í Harrans navni kravdu avkappaðan fingur ella heila hond av upprunafólkinum fyri at lata hermonnum nýggjar patrónir. Hetta er ikki bara nakað, sum gekk fyri seg fyrr í tíðini, men eisini í dag, har alheims risafyritøkurnar í mongum væl dokumenteraðum førum brúka somu mannagongd. Eingin veit rættiliga, hvør eigur tær ella, hvør ábyrgdina hevur; men kristnar siga flest allar seg vera.

Munn av munni vita eisini tey óskúlaðu alt ov væl um hesi viðurskifti at siga, og hóast hetta var áðrenn harðliga fundamentalisman hevði breitt seg um allan heimin, kann eg ikki annað enn bera mongu muslimsku vinfólkum og kenningum alt tað besta frá árum mínum teirra millum, smásyndarar og forherðingar, sum teir vóru, eisini við onkrum reinum banditti inn ímillum, har júst eins og heima hjá okkum sjálvum.

Sitandi fjálg og væl til passar við einum temunni framman fyri sjónvarpinum verða vit dag og dagliga so mikið fóðrað við neyð og elendigheit, at vit, sum frá líður, antin gerast kenslukøld ella so samvitskubitin, at vit hvørt við annað halda, at hetta ber ikki til í longdini, og at okkurt má gerast. Og so verður einki tosað meira um tað, til vit næsta kvøldið aftur gerast skelkað av tí, vit tá síggja.

Meira enn hálva øld hava vit til dømis haft gordiska knútin Ísrael/Palæstina, sum í hesum føri ikki kann loysast við svørði Alexandur Miklasar - jødar/muslimar og kristin og muslimar - um ikki øll runnin av sama blóði so kortini í upprunaligu trúnni við áliti á sama Gud og Skapara.

Nú skal eg ikki gera meg klókan uppá gudfrøði og tílíkt liggjandi á væl hægri støði, enn mær er tillutað at skilja; men mongum brestir ætlan, og tað eg havi roynt at lisið mær til, hugsi eg ikki nakar av teimum stóru trúbótarunum høvdu ætlað ella ímyndað sær ta ótrúligu oyðan og syndran av menniskjalívum, sum misfatan av teirra væl meintu broytingum førdu við sær, hetta kanska í ólukku máta styrkt av gyrnd hins einstaka at nýta hvørt einasta høvi at vinna sær verðsligt og andaligt vald, háls og hondsrætt yvir øllum, ið minni formáddu sær.

Afturat hesum hava vit djúpu gjónna millum ríka og fátæka partin av verðini. Fyrstu ferðina eg, júst fyri hálvari øld síðani, kom í fátæka, tilafturskomna og analfabetiska partin av heiminum, undraðist eg yvir, at ikki fátæka fólkið sum flóðalda skolaði inn í ríka partin at ræna tað, sum har var ella hinvegin í besta lagi har læra seg okkurt, sum heima kundi hækka teimum livifótin.

Tað, sum tá helt teimum aftur, var ókunnleiki um, at onnur fólk høvdu tað betur enn tey sjálvi, hvar hesi vóru at finna, og hvar ríka Kánans landið á okkara ungu døgum mundi liggja.

Kringvarp var teimum ókent fyribrygdi eins og, tá vit á mínum aldri vóru børn, har telefonin kanska bert var í hendinga býlingi..

Hetta er alt við tøknini broytt og fólkaríka flóðaldan er nú fyri langt síðani úr øllum heraðshornum farin at skola inn yvir okkum, sum einki annað er at siga til, enn at vit mugu minnast til, hví tey eru komin og royna sum best at hjálpa teimum til sættis. At kanna, hvønn dugnaskap tey hava í viðføri, at skúla og læra tey tað, sum í restar at fáa sum frægast burtur úr, hetta bæði í útlegd og heima í teirra egna landi - stutt sagt: okkurt má gerast, men hvat? Flest øll hugsa vit; men hvør ger nakað?

Herfyri lætti tí rættiliga um hjartað, tá vit í útvarpinum hoyrdu eina abbadóttir Grækaris uppi í Trøð í Kvívík, Elinborg Hvidtfeldt, greiða frá, at eisini hon sum fólk flest hevði gingið og hugsa, um hon ikki við onkrum smávegis kundi lætt sær um egnu samvitsku í hesum avskeplaða heimi, og tá hon av útbúgving er gullsmiður, fann hon uppá at gera eina brosju sum, alt í einum, avmyndar kristna krossin, jødisku stjørnuna og friðarhonds Khadidju, konu Mohammeds.

Hóast lítil í vavi, sanniliga ein friðarhugmynd av teimum heilt stóru, sum øll kunnu bera, og sum átti at hingið á hvørjari sendistovu, brend ella ikki, sama hvar hon er stødd, og hvørja tjóð ella átrúna, hon umboðar.

Brosjan kostar rættiliga nógv; men ágóðin fer allur til **Peres Center For Peace's Childrens Programme** til at bjarga børnum úr Palestina, sum eru komin illa fyri, og sum verða viðgjørd á ísraelskum sjúkrahúsi í Bethlehem.

Brosjan fæst í Føroyum í fyrrverandi handlinum hjá Hans Iversen, sála,v/Hannemi Hamrá í Kvívík.

Nú var hetta ikki ætlað sum reklamu; men tjóðskaparliga haldi eg tað fjálga, at hugskotið um friðarbrosjuna er av føroyskari ætt, og um onkur kanska hevur hug at hitta Elinborg, sum býr í Danmark, liggur ein lepi við brosjuna, har teldupostadressan er:
*info@elinborg.dk* og *www.peres-center.org*

# Hvar er Robin Hood ?

HELGI ABRAHAMSEN
Floksskrivari hjá Sambandsflokkinum



**Hví skýtur Tjóðveldisflokkurin upp í alternativa fíggjarlógaruppskotinum, at blokkstuðulin ikki skal minka við so mikið sum einari krónu í 2006, tá flokkurin annars vil vera við, at hesin stuðul hevur ongan týdning fyri sosialu vælferðina í Føroyum, spyr Helgi Abrahamsen í lesarabrævi**

Í eini grein, sum stóð í bløðunum seinasta leygardag, segði Høgni Hoydal, at skattalættin hjá sitandi samgongu er til størri gagn fyri háinntøkur í miðstaðarøkinum, enn fyri láinntøkur í útjaðarum bygdum, har kommunuskatturin er hækkaður. Tí kallar hann samgonguna fyri "tann umvenda Robin Hood".

**Spælir Robin Hood**
Fyri nøkrum vikum síðani skrivaði Høgni Hoydal í eini aðrari grein, at meðan fullveldissamgongan sat og minkaði blokkstuðulin, hendu størstu sosialu betringar í Føroyum í mong ár og stættarmunurin minkaði.

Eg loyvdi mær tá at seta honum spurningin, hvørjar ítøkiligar sosialar betringar hendu í Føroyum í tíðarskeiðinum frá 1. januar 2002, tá blokkstuðulin minkaði, til fullveldislandsstýrið legði frá sær í desember 2003? Eisini spurdi eg, hvussu fíggjarstøðan (og harvið útlitini fyri framhaldandi sosialum betringum) broyttust í sama tíðarskeiði? Hvussu stórt var avlopið hjá landskassanum í 2001 (áðrenn blokkniðurskurðin) og hvussu stórt var tað í 2003 (aftaná blokkniðurskurðin), og hvussu stórt hevði avlopið verið, um allur blokkstuðulin hevði verið tikin burtur? Men hevur Høgni Hoydal ikki svarað nøkrum av hesum spurningunum.

**Alternativa fíggjarlógaruppskotið avdúkar veruleikan**
Síðani vísti eg í greinini til alternativa fíggjarlógaruppskotið, sum Tjóðveldisflokkurin gjørdi í heyst og spurdi, hvørjar sosialar betringar eru at síggja í tí uppskotinum, og hvussu stórt er landskassaavlopið í 2006 sambært sama uppskoti?

Víðari spurdi eg, hví Tjóðveldisflokkurin skýtur upp í alternativa fíggjarlógaruppskotinum, at blokkstuðulin ikki skal minka við so mikið sum einari krónu í 2006, tá flokkurin annars vil vera við, at hesin stuðul hevur ongan týdning fyri sosialu vælferðina í Føroyum? Hvussu stórt hevði avlopið verið í uppskotinum, um blokkstuðulin hevði verið tikin burtur av inntøkusíðuni, og hvønn týdning hevði hetta havt fyri sosialu vælferðina? Men heldur ikki hesum spurningunum hevur Høgni Hoydal svarað.

**Hvar er trygdin ?**
At enda spurdi eg: Um vit ímynda okkum, at Tjóðveldisflokkurin broytti sítt alternativa fíggjarlógaruppskot soleiðis at blokkstuðulin bleiv tikin burtur, hvar kundi flokkurin so hugsað sær at spart, soleiðis at sparingin á ongan hátt gekk útyvir sosialu vælferðina hjá føroyingum? Kann Høgni tryggja Føroya fólki, at tað ikki hevði gingið útyvir tey veikastu í samfelagnum, um sparingar fyri meira enn 600 mió. krónur skuldu verið gjørdar í sambandi við at blokkstuðulin bleiv burtur?

**Svar ynskist**
Nú veit eg ikki um Høgni Hoydal metir seg sjálvan at vera ein nútíðar Robin Hood, men enn hevur hann ikki svarað nøkrum av hesum spurningunum, sum eg setti honum í farna mánað. Eg fari tí enn einaferð at heita á hann um at koma við einum svari, heldur enn at royna at tiga spurningarnar burtur. Út frá svarinum kunnu føroyingar so taka støðu til, um Høgni Hoydal er tann Robin Hood, sum hann letst at vera, ella um hann heldur er tað, sum hann sjálvur kallar "tann umvendi Robin Hood".

*helgia@logting.fo*